*Edmund Joensen, løgmaður:*

# Mugu fyrireika okkum væl til oljuvinnu

*-Oljuvinnan varir bert í eina avmarkaða tíð og tí mugu vit tryggja okkum, at henda vinna ikki nervar aðrar vinnur, eitt nú fiskivinnuna, soleiðis at tað verður trupult at fóta sær, tá hetta tíðarskeiðið við olju er liðugt segði løgmaður í "Fimmaranum"*

Jan Muller

Oljuvinnan kann fáa al stóran týdning fyri føroyska samfelagið í framtíðini heldur Edmund Joensen, løgmaður, og tí vónar hann, at vit kunnu fáa eitt breitt og áhugavert orðaskifti um hetta stóra mál einaferð í heyst, tá Oljuráðleggingarnevndini hevur lagt sítt álit fram um gongdina higartil og hvussu farast kann fram víðari.

**Oljan í "Fimmara" í vetur**

Tað var í útvarpssendingini "Fimmarin", at løgmaður nam við spurningin um eina komandi oljuvinnu. Talan var um seinasta fimmaran í hesum umfarinum og bað útvarpið løgmann koma við nøkrum hugskotum um evni at viðgera í sendingini aftur til heystar, og tað var í tí sambandinum, at løgmaður nevndi oljuvinnuna.

Hann vísti á, at tað í løtuni sita fólk og fyrireika eina møguliga oljuvinnu. Álitið frá Oljuráðleggingarnevndini verður so lagt fram í heyst, og tá er tað fyrst og fremst tingið, sum má fara undir eitt orðaskifti, um hvør er rætta leiðin at ganga. Tað skal sjálvandi eisini viðgerast í føroyska samfelagnum.

**Løggáva fyrireikað**

Løgmaður vísir á, at umframt tær mongu kanningar, sum í løtuni eru á føroyskum øki og sum skulu í gongd eitt nú Lopransboringin, so verður løggáva fyrireikað á økinum, tvs. bæði skattaløggáva, umhvørvisløggáva og annars alt tað, sum hoyrir eini oljuvinnu til. So her fyrigongur nógv.

Hann metti tó, at tað liggur nakað úti í framtíðini at fara undir sjálva framleiðsluna.

**Fyrireiking við skili**

Men fyrireikingin av eini oljuvinnu má vera so neyv, at tá ið vit gera tað fyrireikandi arbeiðið, so má tað gerast við skili.

Vit mugu tryggja okkum, at samfelagið er fyrireikað til eina slíka vinnu. Oljuvinnan vita vit varir bara eitt avmarkað áramál - onkur heldur eini 25 ár. Nettup tí mugu vit ansa eftir, at henda vinnan ikki nervar so nógvar aðrar vinnur í samfelagnum, og her hugsi eg serstakliga um fiskivinnuna, soleiðis at tað verður trupult at fóta sær aftur, tá hetta tíðarskeiðið er liðugt.



*Edmund Joensen, løgmaður -Eg síggi fram til eitt gott orðaskiftið um oljuvinnuna í heyst*



**Russiskt seismikkskip á Havnini**

*Sunnukvøldið kom russiska seismikkskipið "Academic Nicolay Strakov á Havnina eftir ymsum lutum tað skal brúka í sambandi við kanningarnar á føroyskum øki*

*Skipið ger seismiskar kanningar fyri tey bæði stóru oljufeløgini, BP og Shell. Í farnu viku vóru fólk frá týsku fyritøkuni Geo Pro í Suðri og settu upp lurtiútgerð. Talan er um eina sokallaða OBS-kanning, har móttakarar verða settir upp á botninum úr Suðuroynni og so í eini beinari linju móti oljukelduni Foinaven hinumegin markið. Mynd Áki*


**Skuldi tú bara tendra kontaktina?**



**Ring til Leif Mohr tlf. 11220**


*Prentararnir:*

# Fingu næstan alt aftur

Randi Jacobsen

Eisini prentaraverkfallið lapst undan í ár.

Mánakvøldið eydnaðist Føroya Prentsmiðjueigarafelag og Føroya Prentarafelag í sátt og semju at gera nýggjan sáttmála, uttan hjálp frá Semingsstovninum.

Prentarafelagið fór til samráðingar við kravinum um at fáa alt aftur, sum felagið misti í 1993 og 1994, og tað eydnaðist teimum - næstan heilt.

Tey 83 oyrum, sum felagið misti í 1994, komu upp á aftur tímaløninna, og teir triggjar hálv frídagarnar við løn, sum felagið misti í 1993, eru nú við aftur, flaggdagurin og 1. mai, men í staðin fyri hálvan frídag við løn grundlógardagurin sum áður, hava tey nú frí hálvan alla halgannadag.

Tveir kaffisteðgir uppá eitt korter hvør um dagin eru komnir við aftur í sáttmálan.

Í 1993 minkaði yvirtíðargjaldið nógv hjá teimum, og nú hava tey fingið tað mesta aftur. 1. yvirtíð fór nú frá 30 upp á 35% (fyrr 50), 2. yvirtíð er 65% og 3. yvirtíð 100%, sum í 1993.

Partarnir hava roknað tað út til, at lønin hjá teimum er hækkað 8%, og tað r næstan alt, ið fór í 1993 og 1994.

Olufta Joensen, forkvinna í Føroya Prentarafelag, er væl nøgd við úrslitið.

Prentsmiðjueigararnir kravdu at gera tvey ára sáttmála, og tað gingu prentararnir við til, treytað av, at allar ábøturnar á sáttmálan komu í einum. Og tað fingu prentararnir. At kom við í nýggja sáttmálanum, sum er galdandi frá 1. mai í ár.


**VITAMIN-HÚÐKREM**

**Burtur við »útslettinum«**
við nýggja kollveltandi vitamin-húðkreminum hjá Dr. Guttorm Hernes

Vitamin-húðkrem hansara hevur vakt mikl-an ans í øllum norðurlondum sum eitt tað virknasta hígartil móti eksemum og alskyns øðrum holdstrupulleikum – serstakliga psoriasis og barnaeksem. – *Eingi hjáárin.*

*Fæst hjá* **NATEN® søla (Føroyar)**
**v/ Anne Mari Samuelsen**

Ordrar verða avgreiddir beinanvegin
Verður sent við postkravi

**Tlf. 18649 · 83649**
**11644**